


Gróbátarin Siri liggur her við bryggju í Havn. Tveir bjargingarbátar og tveir mans vóru við, men bjargingarbátur kom ikki í nýtslu.
Skipasýnið upplýsir at ongar ábendingar enn eru um, hvi Siri koppaði, og at hallroyndir o.a. royndir skulu gerast í vikuni, sum møguliga geva nærri vitan um, hvi vanlukkan hendi.

Hvør hjálpur í sínum lagi

Eftir stendur, at ongar reglur eru fyri at samskipa bjargingararbeiði í Føroyum og at hvør bjargingarstovnur sær nýtir sínar innanhýsisreglur, tá óhapp og vanlukkur stinga seg upp, sum kunnu krevja mannalív - um illa veit við!

Dagny Joensen

HITI - VATN SANITET
Ring **17693**
ella **87693**



Ragnar Jacobsen
Telefon 17693
Fartelefon 87693
Dj. í Geilsgøtu 31
Tórshavn

Marinustøðin:

Umráðandi at koma fram sum skjótast

Ongar samskipanarreglur viðvíkjandi hjálpararbeiði eru galdandi í Føroyum, um óhapp ella vanlukkur henda.

- tyrlan hjá Hvidbjørnen var á kanningarferð, tá boðini um vanlukkuna í Hestfirði komu, og tí var læknin ikki við.

Hjálp sum skjótast

Tá vit fingu boðini um at gróthátarin Siri var koppaður í Hestfirði, og at tveir mans vóru við, avgjørdu vit at fara á staðið beinanvegin - hóast læknin ikki var við.

Vanliga er læknin á Hvidbjørnen altíð við, tá slíkar hendingar fara fram, men av tí at tyrlan var á kanningarferð og tað snúði seg um at koma fram, so skjótt sum til bar, var avgjørt ikki at fara eftir læknanum, sum var umboð á Hvidbjørnen, sigur Eli Lyngvej Larsen, kapteynloydnantur á Marinustøðini.

Einastu reglur Marinustøðin hevur er at boða Landssjúkrahúsinum frá, tá t.d. Tyrlan lendir við sjúklingi, so sjúkrabilur stendur klárur at taka sær av sjúklingum, sigur Eli Lyngvej Larsen.

Til reiðar á staðnum

Á Landssjúkrahúsinum sigur Essa Arge, yvirlækni, at teir ikki hava lækna, ið kann fara út, tá slíkt hendir, sum í hesum føri.

- Vit skulu verða til reiðar at taka móti sjúklingum. Í hesum føri eigur vakthavandi kommunulækni at fáa boð um at fara á staðið.

Tríggir læknar eru á vakt, sum skulu taka sær av fødideildini, skurðdeildini, intensivu deild og skurðstovunum, so vit kunnu ikki bera í bøtuflaka fyri at læknar fara út, tá vanlukka hendir. Teir skulu vera tøkir á staðnum.

Talan hevði verið um at senda ein narkosulækna í hesum føri, men av tí at bert tveir narkosulæknar eru á Lnadssjúkrahúsinum, er vónleyst at tosa um at senda nakran hiðani.

Essa Arge: - Sjúkrahúsreglurnar eru sjúkar og tær krevja viðgerð, men tað er ein politiskur spurningur.

Politikarnir mugu gera sær greitt, at Havnin er miðdepilin og at tað eru her tey stóru tøkini verða tikin.

Ongar samskipanarreglur

Sølvi Winther Olsen, kommunulækni, hevði vakt tá vanlukkan hendi í Hestfirði, men eingin segði honum frá hesum!

Eru ongar reglur, sum siga hvør skal fráboða og hvussu í slíkum føri?

- Ikki mær vitandi. So vítt eg skilji, so verður ringt á Telefonstøðina og haðani fara boðini víðari, har tey hoyra heima.

- Tað er púra greitt, at eingin kann lasta Landssjúkrahúsið fyri, at eingin læknir var á staðnum, tí teir hava sínar uppgávur at røkja, tá soleiðis veit við, sum í farnu viku.

Hvør skal so geva boðini víðari?

- Tað er ein góður spurningur, sum eg ikki dugi at svara. Tá eg fái boð um at fara út til óhapp og vanlukkur, so fari eg avstað - tað er greitt - og so verður alt annað arbeiði steðgað so leingi. Í hesum føri vóru hvørki eg - ella so vítt eg veit - aðrir læknar boðsendir. Um fastar reglur eru fyri fráboðan, veit eg ikki, men um so er, so havi eg ikki hoyrt um tað. Tað er greitt í hesum føri, at málið steðgar upp onkunstaðni og at tað er neyðugt at fáa reglgerð í lag um, hvussu slík fráboðan eigur at verða gjørd sigur Sølvi Winther Olsen at enda.

Vit bera boðini víðari

Tað er 000 á Telefonverkinum, sum boðar frá, tá óhapp ella vanlukkur henda. Her verður stillað beinleiðis um til Brandstøði, Løgreglu ella Landssjúkrahús - alt eftir, hvat fólk biða um.

Fyristøðukvinnan á Telefonverkinum sigur, at telefonistarnir hava ikki annað at gera, enn at beina boðini víðari til rætta viðkomandi. Har verður so nærri boð givin.

Á Politigarðinum sigur vakthavandi, atteir senda boð eftir lækna og sjúkrabili, um talan er um fólkskaðar, tá teir verða boðsendir. Teir vita ikki um aðrar reglur enn tær, sum løgreglan nýtir.

Jóhan Ziskasom, leiðari á Vaktar og Bjargingatænastuni sigur við Sosialin, at teir skipa bjargingararbeiði eftir teimum umstøðum, sum eru galdandi á staðnum. Teir hava heldur ikki fsatar reglur fyri, hvussu slíkt arbeiði skal fara fram.

Einki vikuskifti uttan innbrot

Innbrot og herðverk eru alt meira vorðin dagligur kostur. Í hvussu er um vikuskiftini. að kemur so at siga ikki fyri, at eitt vikuskifti fer afturvið uttan at eitt ella fleiri innbrot hava verið í Havn.

Heldur ikki hetta seinasta vikuskifti var óvanligt.

Onkur, helst ógvuliga tystur, breyt inn í Føroya Bjór goymsluna og tók tveir kassar av øli, og ein av næstu grannum hjá Føroya Bjór, Kaj Andreassen, fekk heldur ikki frið. Har varð eisini brotið inn. Millum annað á skrivstovuna, har einir billyklar vóryu stolnir. Og tá ein hevur fingið fatur billyklunum er lagað manni at fara avsta við bilinum. Tað gjørdu óbodnu gestirnir eisini hesaferð.

Bilurin var seinri funnin aftur. Hann hevði fingið onkran smávegis snuddin, men teir seku ganga enn leysir. Politiið kannar málið, verður sagt.

tór.-

Øll Havnin sær parabol í ár

Eftir at parabolskipanin í Havn fór at virka eru tey fólkini, sum búgva í teimum býarpørtunum, sum enn ikki síggja parabolsjónvarp farin at ótolnast eftir at sleppa upp í part.

Talan er um býðarpartin Norðasta Horn, ein partur við Velbastaðvegin, Yviri við Strond, Undir Heygnum Mikla og á Hvítanesi.

Telefonverkið, sum hevur tekniska partin av arbeiðinum um hendi sigur, at teir rokna við, at øll í Havn fara at síggja parabol einaferð í ár. Hetta verður eftir, at steðin í Nólsoy er uppsett.

Sum er síggja m.o. toftafólk eisini parabolsjónvarpið frá Havnini, men tað fara tey ikki at gera eftir at steðin í Nólsoy er sett upp. Sagt verður, at hetta er ikki av illvilja inn á toftafólk ella onnur. Men bert fyri at gera signalini til Havnina sterkari.

Kaldbaksfólk mugu bíða eitt sindur aftrat til tey síggja parabolsjónvarp. Nær hetta sjónvarpið sæst har enn enn óvist.

tór.-